Tórshavn 22. mars 2013

# Frágreiðing til Rithøvundafelagið um arbeiðið hjá nevndini viðvíkjandi Norðurlendsku Bókmentavirðislønini

Í farna ári hevur formaðurin Bergur Djurhuus Hansen sagt seg úr nevndini, og nýggjur nevndarlimur er Arnbjørn Ó. Dalsgarð. Undirritaða, Ann Ellefsen er nýggjur formaður. Í fjør høvdu vit nakrar fundir um innstilling til bókmentavirðislønina  fyri í ár, og vit avgjørdu at innstilla *Brahmadellarnar* hjá Jóanes Nielsen. Í løtuni eru vit í holt við at avgera, hvør skal innstillast næsta ár.

Mannagongdin í sambandi við handan av virðislønini verður broytt frá í ár, soleiðis at avdúkingin av, hvør fær hana, og handanin av henni verður samstundis, í mun til higartil tá avdúkingin hevur verið um várið og handanin í oktober. Í ár verður avdúkingin í Oslo 30. oktober 2013, tá formansskapurin í Norðurlandaráðnum og Ráðharraráðnum hevur fund har. Allar fimm virðislønirnar, ið Norðurlandaráðið letur, verða handaðar tá, og endamálið er at gera tær meira sjónligar og skapa størri áhuga um tær. Avtalað er við NRK 1 at gera eina sending, ið verður víst hendan dagin, og sum helst eisini verður víst í øðrum norðurlondum.

Miðað verður ímóti, at allir innstillaðir høvundar verða bodnir við, men einki er avgjørt enn um fíggjarligan stuðul til tað.

Vinarliga

Ann Ellefsen

ann@kallnet.fo
+298512332